Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	28. nov. 2025
Mál nr.:	25/25038
Málsviðgjørt:	LP
Ummælistíð:	10. oktober 2025 til 27. oktober 2025
Eftirkannað:	14. nov. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at byggja sambýli til vaksin við autismu við Rygsá á Argjum

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at fara undir at byggja sambýli til vaksin við autismu við Rygsá á Argjum.
Stk. 2. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 115 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2030.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Lógaruppskotið er liður í at loysa stóra bústaðartrupulleikan hjá fólki, ið bera brek og hava tørv á vardum bústaði.

Sambýlið við Rygsá er sambýli, ið verður bygt til vaksin við autismu. Tørvur er á at hava eitt heim til vaksin við autismu at flyta í, tá tey gerast 18 ár. Sambýlið við Rygsá verður til fólk, sum hava miðal til tungan tørv, har sum meginparturin krevja støðugan stuðul og umsorgan alt samdøgrið, og sum hava tørv at fáa serliga lívd, eitt nú í mun til ljós og ljóð.

Við hesum uppskoti fáa vaksin við autismu munandi betri umstøður, ið eru sniðgivnar til teirra tørv, og hóskandi karmar um tann frið og privatlív, sum tey hava rætt til og tørv á.

Eisini fara karmarnir at styðja undir, at húsfólkini kunnu liva eitt so vanligt lív, sum til ber, í umstøðum, ið stuðla heldur enn órógva møguleikan at mennast og trívast.

Innihaldið í varda bústaðnum er nærri lýst í verkætlanaruppskotinum, sum er lagt við sum fylgiskjal 2.

1.2. Galdandi lóggáva
Ongin lóggáva er á økinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at betra um bústaðarumstøðurnar hjá vaksnum við autismu, ið hava serligan tørv og krevja serligar umstøður og umsorgan í gerandisdegnum. Eisini ber á hendan hátt til at byggja serliga vardar íbúðir til teirra, sum í dag hava ringt við at búgva saman við øðrum fólki. Á hendan hátt eru tey vard á bústovninum, samstundis sum tey kunnu gagnnýta teir felags hentleikar, ið til at ber at hava, tá bygt verður í størri eindum. Endamálið er somuleiðis at geva teimum børnum og ungu, sum hava búð á bústovni, varandi bústað at flyta í, eftir tey eru fylt 18 ár.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at vaksin við autismu kunnu flyta í ein bústað við umstøðum, sum eru serliga tillagaðar til teirra tørv, tí bygt verður til endamálið. Øll húsfólkini fáa egna íbúð og egið baðirúm.

Sambýlið hevur 24 búpláss, felagshøli og felags virksemi. Bygt verður í fýra eindum, við seks íbúðum í hvørji eind. Tvær íbúðir verða bygdar í hvørji eind til fólk, sum hava heilt serligan tørv á at verða vard móti óljóði og órógv. Soleiðis vera í alt átta íbúðir av hesum slagi. Hinar 16 íbúðirnar vera vanliga vardar íbúðir. Í øllum eindum er atgongd til felagshøli og felagskøk, umframt at allar íbúðir hava møguleika at nýta beinleiðis inngongd uttanífrá, um húsfólkið og avvarðandi vilja tað. Eisini eru íbúðirnar innrættaðar soleiðis, at til ber at skipa tær eftir tørvi, soleiðis at um eitt búfólk eitt nú gerst røktarkrevjandi, er plass fyri tí.

Sambýlið verður bygt inn í lendið, sum hevur stóran hæddarmun. Bygt verður í trimum hæddum, harav niðasta hæddin bert er at kalla ein hálv hædd við høvuðsinngongd og starvsfólkahentleikum, goymslu og stórkøki. Allar 24 íbúðir vera tí á teimum báðum ovaru hæddunum, sum verða bygdar forskotið, soleiðis at tað bæði hóskar til lendið, og so at íbúðirnar á báðum hæddum hava beinleiðis atgongd út í tún. Eisini verður bygt soleiðis og við heilt serligum atliti at, at óljóð úr erva ikki órógva tey, ið eru serliga ljóð- og ljósviðkvom.

Bygningurin er 2.090 m^2, og grundøkið, ið er keypt frá Tórshavnar kommunu, er 9.250 $m^{2.}$. Byggiloyvið er fingið til vegar frá Tórshavnar kommunu.

Grundøkið skal, umframt sambýlið, eisini hava pláss til, at ein verkstaður kann byggjast á sama stað, og tí verður alt grundøkið gjørt byggibúgvið í senn. Ráðgevin hevur teknað sambýlið soleiðis, at pláss er fyri verkstaði á sama grundøki, og at hesar báðar verkætlanir kunnu brúka felags hentleikar so sum innkoyring, stórkøk, ruskpláss og parkering.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið var til ummælis hjá:

- Almannaverkinum
- MEGD
- Autismufelagnum
- Fíggjarmálaráðnum
- Landsverki
- Pedagogfelagnum
- Brekumboðnum

Hoyringin fór fram í oktober og november 2025. Skipað varð fyri hoyringarfundi og framløgu, tá MEGD, Autismufelagið, Pedagogfelagið, Brekumboðið, Almannaverkið og Landsverk vóru til staðar. Verkætlanaruppskot, lógaruppskot, byggiskrá og tíðarætlan hava verið til ummælis.

Viðgerð av viðmerkingunum

Almanna- og mentamálaráðið hevur fingið viðmerkingar frá MEGD.

Fíggjarmálaráðið, Landsverk, Almannaverkið, Autismufelagið, Brekumboðið og Pedagogfelagið, sum øll hava verið við í ymiskum fyrireikingarstigum til verkætlanina, hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

MEGD
MEGD tekur undir við uppskotinum um at byggja sambýlið til vaksin við autismu við Rygsá á Argjum. MEGD viðmerkir, at tey fegnast um, at Autismufelagið hevur verið hoyringarpartur í allari tilgongdini, og at MEGD eisini hevur fingið høvið at luttaka, og mælir til at samtykkja uppskotið. MEGD hevur nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til almennar byggiverkætlanir til fólk við breki, men bert eina viðmerking til ítøkiligu verkætlanina við Rygsá.

MEGD vísir á, at uppskotið einki sigur um taktil leiðbeiningar- og vegleiðingarmerki, sum kunnu vera hent fyri fólk, sum eru blind ella sjónveik. MEGD vísir á, at hesar tillagingar eiga

at verða framdar á rímiligan hátt, og at uppskotið verður tillagað hesum tørvi uttan at órógva húsfólkið.

Á verkstovum við ráðgeving, har sum starvsfólk hjá Almannaverkinum og Autismufelagið hava luttikið, hvur hesin spurningur verið viðgjørdur. Støða er tá tikin til, at høvuðsatlit skal vera til tann primera brúkaran, og at tá neyðugt er og tørvur er á hesum, skal vera møguligt at gera tillagingar. Íbúðirnar eru sniðgivnar soleiðis, at tað ikki er trupult at broyta og tillaga til ymiskan tørv.

MEGD hevur hesar yvirskipaðu viðmerkingar til at byggja almennar stovnar til fólk við breki. Víst verður á, at stórar byggiverkætlanir kunnu økja um stovnsgerð, og at gransking vísir, at smærri eindir tryggja størri virðing, trivnað og sjálvstøði. MEGD saknar fakligar grundgevingar fyri, at bygt verður í størri eindum, og mælir til, at ein heildar- og ein langtíðarætlan verður gjørd fyri bygging og tænastur til fólk við breki, í samsvari við brekrættindasáttmálan hjá ST. MEGD mælir til, at Landsverk mennir serkøna vitan um algilt snið, so hendan verður savnað og gagnnýtt til framtíðar byggiverkætlanir.

Landsstýrismaðurin er samdur í, at tað hevði verið ein fyrimunur við eini langtíðarætlan, og Almanna- og mentamálaráðið hevur arbeitt við eini slíkari, og við at fáa breiða politiska semju. Hetta hevur tó enn ikki borið á mál.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Samlaði kostnaðurin at byggja nýggja sambýlið er mettur at vera í mesta lagi 115 mió. kr. Í sambandi við fyrireiking og byggibúning verða við árslok 2025 væntandi brúktar 19,3 mió. kr. Samlaða útreiðslan fyri sambýlið við Rygsá verður sostatt 134 mió. kr.

Brúktar eru 2,0 mió. kr. í 2023, 3,3 mió. kr. 2024, og sambært meting verða 14 mió. kr. brúktar í 2025. Sambært kostnaðarmetingini verður soleiðis tørvur á 60 mió. kr. í 2026 og 55 mió. kr. í 2027. Yvirlit yvir útreiðslurnar, býttar yvir ár, er lagt við sum fylgiskjal, sí fylgiskjal 3.

Lógaruppskotið fer at hava øktan rakstur við sær, tó so at eindarkostnaðurin verður munandi bíligari. Sí fylgiskjal 6.

Almannaverkið hevur mett um kostnaðin at reka sambýlið. Árligi rakstrarkostnaðurin er í dagsins prísum mettur at vera 5,4 mió. kr. netto. Umframt eru eingangsútreiðslur í sambandi við flyting og stovnan mettar at vera 660.000 kr. Út frá dagsins prísum, verður dagsprísurin tá 2.247 kr. pr. búfólk.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið. Bygningurin verður hitaður upp við fjarhita, og minst møgulig orka skal brúkast til upphiting og rakstur av bygningi.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Sambýlið fer saman við øðrum byggiverkætlanum munandi at betra um bústaðarumstøðurnar hjá fólki, ið hava tørv á vardum bústaði.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur við sær, at vaksin við autismu, sum hava miðal til tungan tørv á hjálp, fáa munandi betri umstøður enn áður.

Mánaðarliga húsaleigan verður ásett í stigaskipan, ið landsstýrismaðurin hevur góðkent, og verður ásett í mun til stødd og dygd eftir góðkendum leisti, sum er galdandi, tá fólkini flyta inn.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til mannarættindasáttmálan, EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 19 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum á jøvnum fóti við onnur og við somu valmøguleikum.

Limalondini skulu viðurkenna, at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja búgva.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at lúka hesar ásetingarnar.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei

Sosialar avleiðingar		Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Greinin heimilar landsstýrismanninum at fara undir at byggja nýtt sambýli í Tórshavnar kommunu til vaksin við autismu fyri í mesta lagi 115 mió. kr.

Kostnaðarmetingin, sum Landsverk ger, er grundað á innkomin tilboð frá arbeiðstakarum, og rúmar allar útreiðslur í sambandi við at byggja ein almennan bygning eftir at fyrireikingar eru gjørdar. Útreiðslurnar eru býttar sundur í verkevni og yvir ár. Yvirlit er hjálagt sum fylgiskjal 3.

Til § 2
Greinin er gildiskomuregla og sólseturáseting, og lógin fer úr gildi 1. januar 2030. Ásetingin tekur støði í byggiætlanini og teimum royndum, sum eru gjørdar seinastu árini, sum vísa á, at seinkingar, ið ikki víðka fíggjarkarmin, aloftast koma fyri.

Sambært tíðarætlanini, sum Landsverk hevur gjørt, verður byggingin liðug seint í 2027. Samanlagt eru 21 mánaðir settir av til byggingina. Landsverk metir, at tað er nøktandi tíð undir vanligum umstøðum at byggja ein bygning á 2.090 m^2.

Verkætlanartíðarætlanin leggur ikki upp fyri seinkingum í byggingini, tá hetta ikki verður væntað. Tíðarætlanin leggur tó upp fyri møguligum spilldøgum í vetrarhálvum.

Almanna- og mentamálaráðið, 28. november 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Byggiskrá
Fylgiskjal 2: Verkætlanaruppskot
Fylgiskjal 3: Útreiðslur býttar yvir ár
Fylgiskjal 4: Tíðarætlan
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar MEGD
Fylgiskjal 6: Yvirlit yvir væntaðan rakstrarkostnað fyri sambýlið
Fylgiskjal 7: Virksemisyvirlit frá Almannaverkinum